# Sleppa aftur til handils í Norðdepli

**Ein av fyrstu døgunum í november mánaði sleppa fólk í Norðdepli, Hvannasundi og har umvegir umsíðir aftur til handils í Norðdepli**

HANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Nógv fólk hava saknað ein handil her í Norðdepli. Nú kemur hann, sigur Maibritt Sivertsen*
*Mynd: Høgni Thomsen*

**Norðdepil:** Ein handil var herfyri í bygdini, men er nú stongdur aftur.

Av tí at eingin matvøruhandil heldur er á Viðareiði, hava fólk verið noydd at fara til handils í Klaksvík. Nú kemur broyting í.

Í eina tíð hevur Maibritt Sivertsen úr Norðdepli arbeitt við eini ætlan at fara undur ein matvøruhandil í heimi sínum, nærhendis barnaskúlan á Fossánesi.

Hon hevur áður staðið í handli, og veit tí eitt sindur um, hvussu ein veitir viðskiftafólkunum bestu tænastuna og hvat tey ynskja at kunna keypa her.

Ætlanin er at hava tær vanliguhúsarhaldsvørurnar, men av tí at handilin liggur beint við skúlan, verður eisini okkurt til børnini.

Enn er ikki avgjørt, hvat navn handilin skal hava.

- Óhugsandi er ikki, at hann fer at eita Fossábúðin, men enn er einki avgjørt í so máta, sigur hon við Sosialin.

## Lions í Suðuroy fær felagshús

Nú gongur av álvara rætta vegin hjá Lions Club Suðuroy at útvega sær egin felagshús.

Arbeitt hevur verið í eina tíð við at umvæla eini eldri hús í Hovi til endamálið. Komandi summar verða tey eftir ætlan liðugt umvæld, skrivar heimasíðan hjá Suðurrás.

Arbeiðið hjá felagskapinum er skipað soleiðis, at teir 30 limirnir eru býttir sundur í bólkar, soleiðis at hvør teirra sjálvboðin er til verka fjórðu hvørja viku.

Ætlanin er at húsið fyrst og fremst skal brúkast sum felagshús, haðani alt virksemið skal skipast.

Pláss fer at verða fyri umleið 40 fólkum.

**sb.**

